# Hans Fróði skal spæla við B68

*Toftamenn hava gjørt avtalu við Sogndal um at keypa verjuspælaran leysan av sáttmálanum, sum eisini var galdandi fyri komandi ár*



Komandi skal Hans Fróði Hansen leika við B68

Hans Fróði Hansen flytir úr Sogndal og skal komandi ár spæla við B68. Hetta varð greitt mikudagin í hesi vikuni, tá avtala varð undirskrivað millum Sogndal og B68, sum eisini hevur gjørt avtalu við Hans Fróða. Tá Hans Fróði í fjør fór úr HB og til Noregs, skrivaði hann undir ein tvey ára sáttmála. Tí var tað neyðugt hjá B68 bæði at keypa Hans Fróða leysan úr sáttmálanum við Sogndal og at gera eina avtalu við Hans Fróða sjálvan.

Niclas Davidsen, formaður í Tofta Ítróttarfelag, váttar, at teir hava gjørt sáttmálar við Sogndal og Hans Fróða Hansen. B68 formaðurin vil ikki siga nakað um pengarnar, men hann sigur, at sáttmálin, sum teir hava gjørt við Hans Fróða, ber við sær, at landsliðsspælarin verður í B68 í fleiri ár.

**Fleiri kend andlit**

Hans Fróði Hansen sigur, at hann hevur gjørt av at sleppa ætlanini um at liva av at spæla fótbólt í útlandinum. Hann sigur eisini, at síðani tað gjørdist greitt, at hann ætlaði at flyta aftur til Føroya, hevur hann tosað við fleiri feløg í Føroyum.

– Tá tað gjørdist greitt, at Sogndal eisini skuldi verða við í handlinum, so vóru tað ikki so nógv feløg, sum vóru áhugað. At tað í síðsta enda gjørdist B68, komst bæði av, at teir høvdu besta tilboðið, og tí eg haldi, at B68 er áhugavert, tí teir eru eitt felag, sum ger nógv við tað fyri at vera við í toppinum. Teir hava sagt mær, at liðið verður umleið tað sama, sum tað hevur verið í ár, og tað líkar mær væl. Talan er um góðar spælarar, og so telur tað eisini, at eg kenni teir flestu og havi spælt saman við nógvum teirra, sigur Hans Fróði Hansen.

Í 1996 spældi Hans Fróði Hansen við B68. Fleiri av núverandi spælarunum vóru eisini tá á liðnum. Tá Hans Fróði í 1998 og í 1999 spældi við HB, vóru Jákup Eli Olsen, Jan Dam og Súni Fríði Johannesen millum liðfelagarnar. Teir hava allir spælt við B68 í ár, og teir hava allir gjørt avtalu við toftamenn fyri komandi ár.

**jh**

# Útisetarnir aftur í eldin



*Seks landsliðsspælarar kunnu í vikuskiftinum spæla í donsku og norsku landskappingunum*

Hóast fótbóltskappingin heima á landi er farin í vetrarfrí, so heldur ein stórur partur av landsliðsspælarunum fram at stríðast á fótbóltsvøllum í Danmark og Noregi. Eftir at europeisku kappingarnar síðsta vikuskifti hildu frí, tí ein rúgva av HM undankappingardystum vóru á skránni, eru landskappingardystir aftur á skránni.

Í morgin skulu Jákup Mikkelsen og Herfølge spæla í Aalborg, Todi Jónsson og FCK taka ímóti AGF og Óla Johannesen, og mánakvøldið fara OB og Johan B. Hansen á Odense stadion at spæla ímóti FC Midtjylland. Í OB eru viðurskiftini støðug, og teir somu spælararnir eru tøkir, sum hava verið tað undanfarnu ferðirnar.

Í Noregi fær Sogndal í morgin møguleika endaliga at tryggja sær rættin til uppflytingardyst. Teir skulu á útivølli spæla ímóti Raufoss. Í Noregi eru allir tríggir føroyingarnir tøkir, og Sogndal hevur seinastu vikurnar hvørki keypt ella selt spælarar.

**Herfølge**

Jákup Mikkelsen og hinir í Herfølge eru framvegis á niðurflytingarplássi. Tað hevur verið arbeitt við at styrkja um hópin. Nú er endaliga greitt, at 27 ára gamli Thomas Christensen, sum áður hevur spælt tveir landsdystir fyri Spania, fer at spæla við Herfølge. Hann verður kortini ikki á liðnum fyrrenn 29. oktober, tá FCK verður mótstøðuliðið.

Í morgin er møguleiki fyri, at svenskarin Patrik Bengtsson verður á liðnum hjá Herfølge. Hann er 29 ára gamal miðvallari og spældi 1987–1996 í svenska stórfelagnum IFK Göteborg. Seinastu árini hevur hann verið í triðju bestu deildini í Svøríki í einum felag, sum eitur Falkenberg FH.

AaB hevur havt ætlarnir um at vera við í oddastríðnum, men tað hevur hilnast stak illa hjá teimum higartil í ár. AaB er fjórði aftast, nú teir fáa vitjan av Herfølge.

**FCK og AGF**

Todi Jónsson hevur havt ein skaða í lærinum at stríðast við síðstu vikurnar. Tá vit fregnaðust fyrrapartin í gjár var ikki greitt, um hann verður í FCK hópinum í morgin.

Óli Johannesen verður í AGF ferðalagnum í Parkini. Tað er framvegis nógv ferðsla til og úr illa sperda AGF. Peter Degn, sum hevur havt eina miseydnaða roynd sum yrkisspælari í Onglandi, er aftur í felagnum, og tað er Tomas Ingi Tómasson eisini. Hann hevur verið í Vestmannaoyggjunum í tríggjar mánaðir. Tað var tá hann kom til ÍBV, at Allan Mørkøre kom aftur í HB.

Í fyrradagin varð upplýst í AGF, at Michael Nonbo, sum í 1996 kom til AGF úr Næstved, og sum hevur spælt við so at siga hvørja ferð tey seinastu árini, nú hevur skrivað sáttmála við Viborg. Hann fer úr AGF á nýggjárinum.

Í FCK vísa teir á, at hagtølini ímóti AGF eru vánalig. FCK hevur bara vunnið 9 av 24 dystum.

**jh**






Stóra bringu

-ella lítla?

Visti tú at 80% av øllum kvinnum ganga í skeivari BH-støðd?

Vælkomin inn á gólvið hjá okkum og vit hjálpa og vegleiða tær at finna júst tína støðd. Ring til okkum og avtala tíð.

Vit hava BH í støddum úr 65 til 110 cm. í ummáli, og frá AA til H skál.

Vit hava eisini korsilett í stórum støddum

siri lív & heilsa

Dr. Jacobsensgøta 18
100 Tórshavn
Tel./Fax 316610

Sosialurin - 311820

JUNIOR
BUSS TAXA
KOYRING
pláss til 10 ferðandi
Tlf. 22 33 11
Eyðbjartur Danielsen
Pætursgøta 14 • FO-188 Hoyvík • Tórshavn

Sløkki- og neyðútgerð

- Brannslangir
- Slanguvognar
- Eldsløkkjarar
- Brannteppir
- Forbindsskáp
- Børir

*Vit útvega flest alla útgerð innan sløkki- og neyðútgerð.*

Tosið við okkum!

Kaj Andreasen & Co
Sandvíkarhjalli
Tel. 315600 - Fax 318008

Sosialurin - 311820

STATOIL Færøyene AS søkir

íbúð

Í sambandi við oljuleiting søkja vit eftir eini íbúð í Tórshavn til eitt av útlendsku starvsfólkum okkara.

Vit kundu hugsað okkum eitt 2-ára leigumál, ið møguliga kann verða longri. Íbúðin má vera tøk í seinasta lagi 1/1-2001.

Íbúðin má vera í góðum standi við í minsta lagi 2-3 sovikømurum.

Vendið tygum til John Inderhaug á tel 34 35 00 ella skrivliga til:

STATOIL Færøyene AS
att. John Inderhaug
Viðarnes, Postboks 3098
110 Tórshavn

STATOIL

STATOIL Færøyene AS søkir høli til

skrivstovu

Í sambandi við oljuleiting søkja vit eftir skrivstovuhølum miðskeiðis í Tórshavn. Hølini skulu vera um 300 m².

Vit kundu hugsað okkum eitt 3-ára leigumál, ið møguliga kann verða longri. Hølini mugu vera tøk í seinasta lagi 1/1-2001.

Hølini mugu vera í góðum standi og helst hava pláss fyri parkering.

Vendið tygum til John Inderhaug á tel 34 35 00 ella skrivliga til:

STATOIL Færøyene AS
att. John Inderhaug
Viðarnes, Postboks 3098
110 Tórshavn

STATOIL

Fá ókeypis ráðgeving áðrenn tú byrjar nýtt virki

Hugsar tú um at byrja við egnum virki? So kannst tú fáa serkøna ráðgeving áðrenn tú byrjar. Við skipanini "Ókeypis ráðgeving áðrenn byrjan av fyritøku" kannst tú fáa ráðgeving fyri kr. 7.000,- hjá Virkisráðgeving Sp/f sum hjálpir tær í gongd.

- Ráðgevin verður tín samstarvsfelagi, tá ið tú avgerð at byrja við egnari fyritøku
- Tú fær hjálp til at gera eina virkisætlan, ið lýsir fullt út títt hugskot
- Tú fær eisini at vita um so er, at ætlanin ikki tykist burðardygg
- Virkisráðgevin kann eisini vísa til aðrar ráðgevarar, um tað gerst neyðugt

Ynskir tú at vita meira um "Ókeypis ráðgeving áðrenn byrjan av egnari fyritøku" so ring til TK-stovuna.

TK-STOVAN
Niels Finsensgøta 37 • 100 Tórshavn
Tel. 31 73 66 • Fax 31 93 63

Sosialurin - 311820




Ferðaætlan
29. okt. 2000 - 25. mars 2001

| Dagliga: | | Fráferð | Koma |
|---|---|---|---|
| Keypmannahavn - Føroyar | DM181 | 09.35 | 10.55 |
| Føroyar - Keypmannahavn | DM182 | 11.45 | 14.55 |

Eykatúrar um ársskiftið:
20. - 21. - 22. des. & 2. - 3. jan

| Mánadag og hósdag: | | | |
|---|---|---|---|
| Billund - Føroyar | DM285 | 12.05 | 13.00 |
| Føroyar - Billund | DM286 | 13.45 | 16.30 |

*Tó verður ikki flogið til Billund frá 27. nov. - 23. okt.

Eykatúrar um ársskiftið:
20. - 22. des & 2. - 3. jan.

Tað verður ikki flogið 24. - 25. - 31. des

FLOGFELAG FØROYA
Tel 34 00 00 & 33 27 55
E-mail: travel@ff.fo & airport@ff.fo

team 85 · 31 65 11

Hevur tú eini hús til mín?



FØROYA TELE

Føroya Tele arbeiðir í samstarvi við Tórshavnar Kommunu við at byrja dagstovn fyri børn hjá starvsfólkunum. Hús til dagstovn, ið uppfylla hesi krøv, ynskjast til keyps:

- hús í góðum standi í Tórshavn/Hoyvík
- min. 250 m2 gólvvídd í alt
- stórt grundøki
- góð atkomuviðurskifti
- møguligur kjallari má ikki vera undir jørð
- fyrimunur um húsini standa í barnavinaligum grannalagi og tætt við fríøki

Áhugaði kunnu ringja á tel 30 30 30. Øll tilboð verða viðgjørd í trúnaði.

FØROYA TELE

petur & petur 320 870